# Privatlívspolitikkur

**Nov 27, 2023**

## Dátuábyrd hjá Tabletop Føroyum

Vit viðgera persónupplýsingar og hava tit samtykt hendan politikk, sum stutt fortelur tær, hvussu vit viðgera tínar persónupplýsingar.

Gjøgnumgangandi fyri okkara viðgerð er, at vit viðgera persónupplýsingar til ávís endamál og út frá lógligum áhugamálum. Vit viðgera einans persónupplýsingar, sum eru viðkomandi og neyðugir fyri at røkka ásettum endamálum, og vit strika tínar upplýsingar, tá teir ikki eru neyðugir longur.

## Kontaktupplýsingar hjá dátuábyrgdaranum

Tabletop Føroyar er dátuábyrgdari, og vit tryggja, at tínir persónupplýsingar blíva viðgjørdir í samsvari við lógina á økinum. Kontaktupplýsingar:

Kontaktpersónur: Nevndarformaðurin, Esbern á Geilini

Bústaður: Steigarbrekka 32, 360-Sandavágur

V-tal: 647969

Telefonnr.: 751276

Teldupostbústaður: esbern@tabletop.fo

Heimasíða: tabletop.fo

## Viðgerð av persónupplýsingum

Vit viðgera fylgjandi persónupplýsingar:

1) Limaupplýsingar:

- Vanligar persónupplýsingar:
    - Navn, bústað, tilmeldingardato, telefonnummar, føðidato, teldupostbústað.

2) Upplýsingar um nevnd og sjálvboðin:

- Vanligar persónupplýsingar:
  - o Navn, bústað, telefonnummar og teldupostbústað
  - o Aðrar upplýsingar um álitispostar, aðrar leiklutir í mun til dátuábyrgdaran og peningastovnskontonummar

**Her fáa vit upplýsingar frá**

Vit fáa bert upplýsing frá tær.

**Endamálið hjá felagnum við viðgerðini av tínum persónupplýsingum**

Vit viðgera tínar persónupplýsingar til greið ásett endamál, tá vit hava eina lógliga heimild.

Lóglig heimild til at viðgera er serliga:

- · At viðgerðin er neyðug fyri at fylgja einum heimilaðum áhugamáli hjá felagnum, har áhugamálini hjá skrásetta ikki ganga framum
- · At viðgerðin er neyðug fyri at halda eina avtalu við teg
- · Viðgerð sum fylgi av lógarkrøvum
- · Viðgerð við samtykki

Endamálini:

1) Endamál við viðgerð av limaupplýsingum:
   - · Handfaring av limaskapi, undir hesum uppkrevjing av limagjøldum
   - · Gjøgnumføring av tiltøkum og stevnum
   - · At liva upp til lógarkrøv
   - · Veitan av vørum og tænastum sum limirnar hava bílagt
   - · Umsiting av limaskapi og relatiónini hjá limum yvirfyri dátuábyrgdaran

2) Endamál við viðgerð av upplýsingum um nevnd og sjálvboðnum:

· Handfaring av uppgávum og skyldum hjá nevndini og sjálvboðnum hjá dátuábyrgdaranum

· At liva upp til lógarkrøv

· Umsiting av relatiónini hjá nevndini og sjálvboðnum yvirfyri dátuábyrdarum

*Síður á sosialu miðlunum*

Felagið er aktivt á teimum sosialu miðlunum. Í løtuni hevur felagið eina síðu á Facebook og á Instagram.

Tá tú samvirkar við felagið á síðuni á Facebook ella Instagram, gert tú upplýsingar atkomuligar fyri felagið og sosiala miðilin, t.d. tá tú reagerar uppá uppsløg hjá fyritøkuni, viðmerkjur og víðarideilur tey, eins og fyritøkan viðgerð upplýsingar um at tú "dámar" virkissíðuna ella fylgir fyritøkuni á sosiala miðlinum. Harumframt blíva vanligir upplýsingar um teg viðgjørdir, sum t.d. samleikaupplýsingar, kontaktupplýsingar osv. Endamálið við viðgerðini er at marknaðarføra felagið.

Rættargrundarlagið fyri viðgerðini er at finna í § 8, stk. 1, nr. 6 í dátuverndarlógini og tí heimilaða áhugamálinum hjá felagnum at marknaðaføra seg sum felagsskap á teimum sosialu miðlunum.

Við at brúka hesar báðar sosialar miðlar gera hesir sjálvir brúk av teimum upplýsingum, sum blíva savnaðir inn umvegis síðuna hjá felagnum, og felagið og Facebook kunnu sigast at vera felags dátuábyrgdarar fyri viðgerðini av hesum upplýsingum.

Tú kann lesa meira um felags dátuábyrgd, undir hesum eisini ábyrgdarbýtið, viðgerðina osv. við Facebook her https://www.facebook.com/legal/terms/page_controller_addendum.

Upplýsingar á sosialu miðlunum blíva í høvuðsheitum strikaðir tá felagið strikar eitt uppslag, ella tá tú strikar tína viðmerking, víðarideiling, reaktión ella tekur aftur, at tú "dámar" ella fylgir felagnum á sosiala miðlinum.

**Vit viðgera bara persónupplýsingar út frá lógligum áhugamálum**

Í teimum førum vit viðgera tínar limaupplýsingar við støði í eini vigan av áhugamálum hjá okkum sett upp ímóti áhugamálum hjá tær sum skrásetta, vil viðgerðin einans vera motivera av lógligum áhugamálum sum t.d.:

· Handfaring av tínum rættindum sum limi í felagnum

· Uppkrevjan av limagjaldi

· Fyriskipan av sosialum tiltøkum í felagnum

· Brúk av støðumyndum tiknar í felagnum í sambandi við tiltøk ella sosialan aktivitet í felagnum

· Vit atliti til kontaktmøguleikar kunnu tað fyri børn og ung undir 18 ár eisini viðgerast upplýsingar um foreldrini

· Víðarilating av tínum vanligu persónupplýsingum til Føroya Ungdómsráð (FUR)

· Ávísing til navn og telefonnummar hjá fyriskiparum á tiltøkum.

**Samtykki**

Oftast vil okkara viðgerð av tínum persónupplýsingum vera grunda á aðra heimild enn samtykki, sum t.d. § 8, stk. 1, nr. 6 í Dátuverndarlógini umframt § 12, stk. 1, nr. 5 í somu lóg.Vit innheinta tí bert títt samtykki, tá tað er neyðugt fyri at viðgera tínar persónupplýsingar til tey endamál, sum eru lýst omanfyri.

Um vit innheinta samtykki frá tær, er tað sjálvboði um tú vilt geva okkum hetta og tú kann til eina og hvørja tíð trekkja títt samtykki aftur við at geva okkum boð um hetta.

Tá vit innheinta persónupplýsingar um børn og ung, gera vit eina meting av, um barnið sjálvt er ført fyri at geva neyðugu upplýsingarnar. Um ikki, so innheinta vit samtykki frá einum foreldri. Okkara aldursmark fyri hesum er í útgangsstøðinum 13 ár.

**Víðarilatan av tínum persónupplýsingum**

Í sambandi við tiltøk, legur og líknandi víðarilata vit vanligar upplýsingar um luttøku til viðkomandi felagsskapir.

Víðarilatan av upplýsingum um nevnd og sjálvboðin fer í viðkomandi vavi fram til landsfelag og felagsskapir, sum felagið er limur í.

Navn og telefonnummar hjá sjálvboðnum, ið varða av ymsum tiltøkum, kunnu verða, við samtykki, gjørd almenn tøkt, soleiðis at viðskiftarar at tiltøkunum kunnu fáa samband við viðkomandi.

Vit víðarigeva ikki viðkvæmar persónupplýsingar uttan títt samtykki.

Vit víðarigeva ikki persónupplýsingar til fyritøkur til marknaðarføring uttan títt samtykki.

**Goymsla og strikan av tínum persónupplýsingum**

Vit hava ymisk viðgerðarendamál og goymslutíðir alt eftir um vit viðgera tínar persónupplýsingar sum lim í felagnum, sum sjálvboðin ella sum løntur leiðari ella líknandi.

<u>Limir:</u>

Vit ynskja at goyma tínar persónupplýsingar í eitt tíðarskeið frá tí at limaskapurin heldur uppat og í samsvari við fylgjandi orsøkum:

· Av praktiskum og umsitingarligum áðum goyma vit tínar vanligu upplýsingar í upp til 1 ár eftir kalendaraárið fyri tína útmelding av felagnum

<u>Óløntir leiðarar og líknandi:</u>

Vi ynskja at goyma tínar persónupplýsingar í eitt tíðarskeið frá tú steðgar við tínum virksemi í felagnum í samsvari við fylgjandi orsøkum:

· Av praktiskum og umsitingarligum atlitum goyma vit tínar vanligu limaupplýsingar í upp til 1 ár eftir at títt virksemi í felagnum er hildi uppat

Vit goyma tó upplýsingar um bæði limir, leiðarar og sjálvboðin til hagtøl og líknandi, so leingi tey hava eitt søguligt virði.

**Tíni rættindi**

Tú hevur eina røð av rættindum sambært lóggávuni tá vit viðgera persónupplýsingar um teg:

- Rætturin til at blíva kunnaður um viðgerðina av tínum upplýsingum
- Røtturin til innlit í egnar upplýsingar
- Rætturin at fáa skeivar upplýsingar rættaðar
- Røtturin at fáá upplýsingar strikaðar
- Rætturin til avmarkaða viðgerð
- Rætturin til dataflutning
- Rætturin at mótmæla

Tú kann gera brúk av tínum rættindum við at venda tær til okkum. Sí kontaktupplýsingar ovast.

Tú kann eisini altíð klaga um viðgerðina til Dátueftirlitið.

**Endurskoðan av privatlívspolitikkinum**

Vit taka okkum rættin til at gera broytinggar í hesum politikki tá vit meta tað neyðugt. Í sambandi við broytingar vil dagfestingin ovast á skjalinum blíva broytt. Tann til eina og hvørja tíð galdandi privatlívspolitikkur í felagnum vil vera at finna á heimasíðu felagsins. Við týðandi broytingum fáa limir og aðrir persónar í felagnum beinleiðis boð.